UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Tórshavn, tann 30. juni 2023

# Reglugerð
# fyri
# stuðul til niðurtøku og burturbeining av oljufýrum

## Endamál

**§ 1.** Reglugerðin ásetir treytir fyri stuðulsveiting av konto 18.30.1.13. Stuðul til niðurtøku og burturbeining av oljufýrum

*Stk. 2.* Endamálið við játtanini er at stuðla privatum borgarum, sum taka niður og burturbeina egna oljufýrskipan í sambandi við umlegging til aðra góðkenda hitaskipan.

*Stk. 3.* Stuðul verður einans veittur einstaklingum, t.e. ikki fyritøkum, felagsskapum v.m.

## Stuðulstreytir

**§ 3.** Oljufýrskipanin skal skiftast út við góðkenda staðbundna elrikna hitapumpuskipan ella við íbinding í góðkenda fjarhitaskipan.

**§ 4.** Oljufýring og ketil skal burturbeinast á góðkendum burturbeiningarstað, t.e. á móttøkustaði hjá IRF ella á Kommunalu Brennistøðini.

## Umsókn

**§ 5.** Umsóknir um stuðul fyri árið 2023 skulu vera Umhvørvisstovuni í hendi áðrenn 1. februar 2024.

*Stk. 2.* Umsóknir skulu skrivast á **oyðublaðið** “Umsóknarblað til stuðul til niðurtøku og burturbeining av oljufýrskipanum”, sum er tøkt á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni (www.us.fo).

*Stk. 3*. Til umsóknina skal viðleggjast:

1. Váttan um burturbeining av oljufýri frá IRF ella Kommunalu Brennistøðini
2. Váttan frá góðkendum hitapumpuinstallatøri, at lagt er um til elrikna hitapumpuskipan, ella váttan frá fjarhitafelag um, at íbundið verður í góðkenda fjarhitaskipan.

*Stk. 4*. Umsóknin við fylgiskjølum skal sendast til us@us.fo

## Útgjald

**§ 6.** Veittar verða 6.000 kr. í stuðli treytað av, at Umhvørvisstovan hevur fingið fullfíggjaða umsókn við fylgiskjølum, og at játtan er tøk.

## Gildiskoma

**§ 7.** Henda reglugerð kemur í gildi 1. juli 2023. Stuðul verður einans latin fyri burturbeining av oljufýrskipanum eftir 1. juli 2023.

Umhvørvismálaráðið, 30. juni 2023

Ingilín D. Strøm
landsstýriskvinna